# Skatta- og avgjaldsmál avgerðir

| Mál nr.: 09-02-24-19 | Lóg: Skattalógin § 104 | Avgerð tikin: 01.07.2010 |
|---|---|---|

## Sýtt at eftirgeva sekt

**Samandráttur:**
**Kært er um, at TAKS hevur noktað at eftirgeva sekt, sum er áløgd sambært § 104 í skattalógini orsakað av, at sjálvuppgávan fyri 2008 er latin inn ov seint. Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS at nokta eftirgeving av sektini sambært § 104, stk. 3 í skattalógini, tí tað ikki er fyrstu ferð, at kærarin letur sjálvuppgávu inn ov seint, og talan ikki er um slíkar serligar umstøður, at sektin kann verða eftirgivin.**

### Avgerð

**Kært er um**, at TAKS hevur noktað at eftirgeva sekt, sum er áløgd sambært § 104 í skattalógini orsakað av, at sjálvuppgávan fyri 2008 er latin inn ov seint.

**TAKS** førir fram í ummælinum, at kærarin er skrásettur sum eigari av einstaklingavirki, og fær tí sjálvuppgávu sendandi á hvørjum ári, sum skal sendast aftur til TAKS saman við skattligum roknskapi, í seinasta lagi 1. mai árið eftir.

Eingin sjálvuppgáva fyri 2008 er innsend til TAKS, tá innlatingarfreistin er farin, so bræv um, at skattskylduga inntøkan hjá kæraranum verður sett til metta upphædd eftir § 104 í skattalógini, verður sent honum 25. september 2009.

Sjálvuppgáva og roknskapur fyri 2008 kemur síðani til TAKS 8. oktober 2009, og verður sjálvuppgávan skrásett sum innkomin tá.

Av tí at sjálvuppgávan ikki er latin inn rættstundis, tvs. í seinasta lagi 1. mai 2009, er inntøkuskatturin hækkaður við 5 pct., tó í mesta lagi 5.000 kr., sambært § 104 í skattalógini – orsakað ov seinari sjálvuppgávu.

Sektin er roknað til 2.056,40 kr.

Eftirgeving av hesi sekt verður bara givin, tá ið talan er um heilt serligar umstøður. Tað kunnu vera serligar umstøður so sum sjúka, deyði, vanlukka o.l.

Sambært kæruni er orsøkin til ov seinu sjálvuppgávuna, at kærarin helt, at hon var innsend.

Tað vil siga, at talan er ikki um umstøður, ið koma undir serligu umstøðurnar, ið loyva eftirgeving, og tískil kann umsókn kærarans ikki gangast á møti, og sektin eftir § 104 í skattalógini fellur sostatt ikki burtur.

Upplýsast kann, at kærarin hevur áður innlatið sjálvuppgávu ov seint. Talan er um sjálvuppgávuna fyri 2006, ið varð móttikin í TAKS 20. september 2007 (rættstundis var 1. mai 2007), men tá var av einhvørjari orsøk ikki áløgd sekt fyri ov seina innlating.

Í avgerðini hjá TAKS verður víst til § 104, stk. 3 í skattalógini.

**Kærarin** førir m.a. fram í kæruni, at TAKS sendir eitt bræv dagfest 25. september 2009 um manglandi innlating av sjálvuppgávuni fyri 2008. Kærarin er í Danmark tá, og sær brævið tann 2. oktober 2009, tá hann kemur heim aftur úr Danmark.

Orsøkin til, at sjálvuppgávan er latin inn ov seint, er, at kærarin hevur hildið, at hann hevði latið sjálvuppgávuna inn, og at alt var í lagi.

Kærarin finst at, at hann ikki fær brævið um tað manglandi sjálvuppgávuna fyrr enn í oktober, og at hann ikki fær eina ávaring og ein møguleika at lata sjálvuppgávuna inn innan eina nýggja freist, áðrenn sekt verður áløgd honum.

Tað er ikki vegna sløsarí ella manglandi vilja frá hansara síðu, at sjálvuppgávan ikki er latin inn til tíðina. Kærarin hevur bara ikki verður greiður yvir, at hann ikki hevði latið sjálvuppgávuna inn. Kærarin ynskir at samstarva, og tað ganga bert 6 dagar frá, at hann lesur brævið frá TAKS dagfest 25. september 2009, og til kærarin letur inn sjálvuppgávuna fyri 2008.

Kærarin finst eisini at upphæddini á 5.000 kr., og heldur, at hetta er ov nógv at rinda í sekt fyri at lata sjálvuppgávuna ov seint inn.

**Avgerð frá Skatta- og avgjaldskærunevndini**
Sambært § 104, stk. 2 í løgtingslóg nr. 86 frá 1. september 1983 um landsskatt og kommunuskatt (skattalógin) verður sekt áløgd við í mesta lagi kr. 5.000, um fullfíggjað sjálvuppgáva av inntøku ikki verður latin Toll- og Skattstovu Føroya rættstundis, ella sjálvuppgávan ikki kemur inn. Verður latið inn minni enn 7 dagar ov seint verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 2%. Verður latið inn 7 dagar ella meira ov seint, verður samanlagdi inntøkuskatturin hækkaður við 5%.

Tað framgongur av hesi grein, at sekt skal áleggjast einum skattgjaldara, um sjálvuppgávan ikki verður latin TAKS, ella um sjálvuppgávan ikki verður latin inn rættstundis. Skattgjaldarin fær í hesum sambandi onga ávaring við møguleika at lata sjálvuppgávuna inn innan eina nýggja freist fyri at sleppa undan sektini.

Sambært § 104, stk. 3 í skattalógini hevur TAKS tó heimild at eftirgeva sekt, sum verður áløgd, um sjálvuppgáva o.a. verður latið ov seint inn, tá tað av serligum orsøkum verður hildið at vera rímiligt.

Viðmerkingarnar til hesa grein siga, at undantak kann verða gjørt, um "tað bert kemur fyri eina ferð, og umstøðurnar annars tala fyri at eftirgeva sektina; serligar umstøður eru eitt nú sjúka, deyði og vanlukkur, sum hava við sær, at skattgjaldarin ikki fær latið sjálvuppgávuna inn rættstundis. Tað, at grannskoðarir, bókhaldarir eru ov seinir í sínum arbeiði, er eitt nú ikki ein umbering fyri frítøku av sektini."

Sambært upplýsingunum frá kæraranum og TAKS er hetta ikki fyrstu ferð, at kærarin ikki letur sjálvuppgávuna inn til tíðina, og hetta hevur í sjálvum sær við sær, at sektin ikki kann eftirgevast.

Hartil er upplýst, at orsøkin til, at sjálvuppgávan hjá kæraranum fyri 2008 ikki varð latin TAKS rættstundis, var, at kærarin helt, at sjálvuppgávan longu var latin TAKS. Her er ikki talan um umstøður sum t.d. sjúka, deyði ella vanlukka, sum kunnu metast at vera serligar sambært § 104, stk. 3 í skattalógini.

Viðvíkjandi sektarupphæddini kann viðmerkjast, at sjálvuppgávan er latin inn 7 dagar ella meira ov seint, og inntøkuskatturin verður tí hækkaður við 5% sambært § 104, stk. 2, 3. pkt. í

skattalógini. Inntøkuskatturin er upplýstur at vera kr. 41.128, og sektarupphæddin er 5% av hesum, sum er kr. 2.056,40.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin hevur avgjørt at staðfesta avgerðina hjá TAKS at nokta eftirgeving av sektini sambært § 104, stk. 3 í skattalógini, tí tað ikki er fyrstu ferð, at kærarin letur sjálvuppgávu inn ov seint, og talan ikki er um slíkar serligar umstøður, at sektin kann verða eftirgivin.**